## DAGSINS MEINING

# Eitt stórt framstig!

Boðskapurin frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum um, at stuðul nú verður latin, soleiðis at 136 nýggj eldrabúpláss kunnu útvegast í fleiri kommunum, er at fegnast um. Hetta lættir nógv um trupulleikan, sum ikki hevur havt hægstu raðfesting.

Tað gav at bíta, nú so nógv tos hevur verið um undirsjóvartunlar - seinast tunnilin í Sandoynna. Ikki tí, vit síggja væl - sera væl - tørvin bæði sandoyingar og suðuroyingar eisini hava á at fáa fast samband við meginøkið, so landið alt kann knýtast saman í eina eind. Hetta fer heilt víst eisini at føra til sparingar á so nógvum økjum, so at fleiri midlar tá eisini verða til at raðfesta eldraøkið hægri.

Men harfyri mugu vit sýna teimum trupulleikum ans, sum vit hava her og nú. Vit mugu ikki lata okkum taka av fótum, men eisini viðgera trupulleikarnar sum eitt nú fólkaskúlin hevur eins og eldraøkið.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum og samgongan annars eigur rós uppiborið fyri hetta stigið at útvega 136 nýggj eldrabúpláss. Næsta stigið, ið eigur at verða tikið - umframt at nøkta allan tørvinum á økinum - verður at skapa umstøður fyri at byggja eldraíbúðir.

Nógv eldri fólk vildu fegin skift sín bústað um við eina eldraíbúð - og á tann hátt høvdu við eisini bøtt um íbúðartørvin annars.

Eftir hetta stigið hómast nú málið, sum er at nøkta allan tørvin á eldrabúplássum - sum er minsta kravið vit kunnu seta okkum, um vit vilja kalla okkum eitt vælferðarsamfelag - og tað var ikki verrið um komið var væl og virðiliga á mál fyri 2015!

**Sosialurin**

# 136 nýggj eldrabúpláss kring landið

**Landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um at játta studningslán**

ELLIS- OG RØKTARHEIM

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, gjørdi mikudagin av at geva 9 umsóknum tilsøgn um studningslán til bygging av eldrabúplássum.

Hetta fer at útvega 136 nýggj eldrabúpláss kring landið.

-Tað er álagt mær sambært lóggávuni at hyggja eftir tørvinum á eldrabúplássum kring landið, og tað er út frá hesi fyritreyt, at eg havi gjørt av at veita stuðul, sigur Hans Pauli Streøm. Suðulin verður latin til hesi øki:

**Suðurstreymoy:** Bygging av ellis- og røktarheimi við Hoyvíkstjørn til 24 búfólk, studningslán 12 mió. kr.

Røktarheim á Boðaneshamri til 24 búfólk, studningslán 12 mió. kr.

Reststuðul til røktarheimið Tjarnargarð, kostnaður 280 tús. kr.

Í alt hevur landsstýrismaðurin gjørt av at veita góðar 24 mió. kr. til verkætlanir í Tórshavnar kommunu, sum fara at geva í alt 48 nýggj búpláss.



*- Tað er álagt mær sambært lóggávuni at hyggja eftir tørvinum á eldrabúplássum kring landið, og tað er út frá hesi fyritreyt, at eg havi gjørt av at veita stuðul, sigur Hans Pauli Strøm. Hann hevur júst tikið avgerð um at játta stuðul soleiðis, at 136 nýggj eldrabúpláss verða skapt*

**Suðuroyggin:** Bygging av eldrasambýli á Tvøroyri til 16 búfólk, studningslán 800.000 kr.

Bygging av røktarheimi í Vági til 24 búfólk, studningslán 12 mió. kr.

Hesar játtanir skuldu gjørt at allur tørvurin í Suðuroynni verður nøktaður.

Vestari partur av Heimarøktarøki 2, sum fevnir um Vestmanna, Kvívík, Leynar, Stykkið, Skæling, Vágar og Mykines:

Bygging av eldrasambýli í Sørvági til 10 búfólk, studningslán 500 tús. kr.

Bygging av ellis og røktarheimi í Vestmanna til 24 búfólk, studningslán 12. mió. kr.

Hesar játtanir skuldu gjørt at allur tørvurin í Vágum og Norðstreymi verður nøktaður

**Norðoyggjar:** Bygging av eldrasambýli í Svínoy til 8 búfólk, studningslán 400 tús. kr.

**Eysturoyggin:** Víðkan av eldrasambýlinum í Gøtu frá 10 til 16 búpláss, studningslán 300.000 kr.

Henda játtan skuldi gjørt at allur tørvurin í Eysturoynni verður nøktaður

Talan er sostatt um tilsagnir uppá íalt góðar 50 mió. kr., ið sum nevnt fara at geva 136 nýggj eldrabúpláss tey næstu 2-3 árini.

Tørvskanningin, sum varð handað landsstýrismanninum í juli 2005 vísir, at tørvur er á 151 eldrabúplássum kring landið.

Við hesum er nærum komið á mál, og fegnast landsstýrismaðurin um, at politiskur vilji er frá bæði lands- og kommunumyndugleikum til at taka hesi stóru stig til frama fyri okkara gomlu, sum hava hesa røkt og umsorgan fyri neyðini.

# Byggja økisdepil fyri sinnisveik í Suðuroy

**Landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur fingið undirtøku í landsstýrinum og samgonguni fyri eini ætlan um at byggja ein Økisdepil fyri sinnisveik í Suðuroy**

ALMANNAØKIÐ

Ætlanin er at gera ein Økisdepil fyri sinnisveik í tilknýti til ætlaðu byggingina av einum røktarheimi í Vági, sum kommunurnar í Hovi, Porkeri, Vági og Sumba verða felags um. Økisdepilin fyri sinnisveik verður tó bygdur og rikin sum ein landsstovnur burturav.

Henda ætlanin er grundað á tilmæli frá Psykiatriska deplinum á Landsjúkrahúsinum og Deildini fyri sinnisveik í Heimarøktini og Serforgini. Tað hevur longu verið greitt, at tørvurin er stórur á serligum átøkum fyri sinnisveik í Suðuroy. Tað verður millum annað staðfest í tørvsmetingum, sum landsstýrismaðurin hevur fingið frá Psykiatriska deplinum og Heimarøktini og Serforsorgini í februar í ár.

Ætlanin við hesum nýggja stovni er at samskipa bæði sosialpsykiatrisk bústaðar- og virknistilboð og økispsykiatriskar fyribyrgjandi og eftirviðgerandi tænastur fyri sinnisveik í Suðuroy.

Støddin á stovninum verður ætlandi 8 sosialpsykiatrisk búpláss og 2 umlættingarpláss, umframt høli til virknistilboð, økispsykiatriska viðgerðar- og ráðgevingartænastu og ein miðstøð fyri stuðulsskipanina fyri sinnisveik, sum er í oynni.

Málið verður lagt fyri løgtingið eftir ólavsøku, og er ætlanin at samskipa byggingina mest møguligt við ætlaðu byggingina av røktarheiminum í Vági.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo

e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.